Hákun Djurhuus, SEV stjóri, Aksel Johannessen, løgmaður og Sjúrður Skaale, fólkatingsmaður fara fyrrapartin á pallin á stóru arktisku ráðstevnuni í Reykjavík. Mynd Jan Müller/oljan.fo

# Løgmaður á pall í Hørpu

**Jan Müller**

17.10.2015 - 11:41

Oljan.fo

Nú fyrrapartin fer Aksel Johannesen, løgmaður á pall á arktisku ráðstevnuni í Reykjavík, saman við stjóranum í SEV, Hákup Djurhuus og Sjúrða Skaale fólkatingsmanni. Teir tríggir fara at varpa ljós á støðu Føroya í Arktis við serstøkum atliti til Føroyar sum tænastumiðdepil fyri ferðslu, shipping og undirstøðukervi í Arktis. Teir fáa ein av stóru pallunum í Hørpuni, har ráðstevnan verður hildin fyri umleið 1500 fólkum úr øllum heiminum.

Í gjár høvdu tveir føroyingar høvi til at halda røður. Tað vóru Jørgen Niclasen, næstformaður í Útnorðurráðnum og Ásmundur Guðjónson, stjóri í felagsskapinum Nora.

Dagurin í gjár endaði við, at franski forsetin Francois Hollande talaði um veðurlagsbroytingar í Arktis, nú stutt undan, at París fer at hýsa ST ráðstevnu um nettupp veðurlagsbroytingar í heiminum.



